# Betri eftirlit á sjónum

Norska sjóverjan er farin undir at fyrireika norska partin av einari skipan, sum skal hava eftirlit við skipaferðsluni. Talan er um eina skipan, sum umvegis fylgisvein kann staðfesta, hvar einstøk skip eru stødd. Umframt vanligt eftirlit fyri at tryggja ferðsluna og til hjálp í sambandi við bjarging á sjónum kann skipanin eisini nýtast til at finna skip, sum fiska ólógliga. Herumframt kann skipanin brúkast í bardaganum ímóti yvirgangi á sjónum.



*Skipanin kann kanska eisini avdúka skip, sum koyra olju í havið (Mynd: Nordlys)*

# Bókaútsølan er byrjað

**Fleiri enn 400 bókatittlar eru at velja ímillum á stóru føroysku bókaútsøluni, sum byrjaði í gjár kring alt landið**

BÓKAÚTSØLA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í gjár byrjaði tann stóra føroyska bókaútsølan fyri áttandu ferð og hon heldur fram til 3. mai.

Hesuferð eru fleiri enn 400 bókatittlar frá 18 ymiskum forløgum drignar fram undan væðingini at velja ímillum bæði til børn og til vaksin.

Prísirnir fara heilt niður í fimm krónur fyri onkrar av bókunum, so møguleiki skuldi verið, at gjørt okkurt gott bókahál.



*Møguleiki er at gera okkurt gott bókahál, nú stóra føroyska bókaútsølan er byrjað*

### Nýggjari bøkur

Vanligt var, at føroyska bókaútsølan var 3 hvørt ár, men av tí at tað koma so nógvar bøkur nú, halda fyriskiparararnir, at grundarlag er fyri at hava hana oftari.

Reglurnar fyri bókaútsøluna eru, at sama bókin sleppur ikki meira enn tvær ferðir við í lýsingarblaðið - hetta fyri ikki at fylla blaðið við "gomlum" útsølunýggjheitum.

Lýsingarblaðið verður sum vanligt borið út til hvørt húsarhald.

Bókhandlarafelagið saman við Bókadeild Føroya Lærarafelags skipar fyri útsøluni. Tað er Grafikstudio sum hevur gjørt lýsingarblaðið hesuferð.

Bøkurnar vera seldar í hesum bókhandlunum: Í Havn Rit & Rák í SMS, H.N. Jacobsens bókhandli og Hjalmar Jacobsens bókhandli, Í Klaksvík í Alfa Bókhandli og Leikalund, Í Runavík í Bókabúðini og í Heimavirkinum í Vági.

## Ups, Flekk gloymdi okkurt




*Flekk svevur hjá vini sínum* er heitið á nýggju bókini um hundin Flekk, sum flestu føroysk børn munnu kenna.

Hesuferð sleppur Flekk at sova hjá vini sínum Sørin. Brádliga varnast Flekk, at hann hevur gloymt eina tasku eftir heima. Lukkutíð kemur mamman við taskuni. Hvat tað var, sum var í taskuni, fara vit ikki at avdúka. Tað goymir seg sum vant aftanfyri ein klaffa í Flekk bókini.

Í januar mánað fekk høvundurin Eric Hill høgt metta OBE heiðurin fyri sínar bøkur um Flekk.

Tað er Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum gevur út *Flekk svevur hjá vini sínum.*

**ave**

# Meldur og stolin steinur




Nýggja *Vár-meldurbókin* er onnur av meldurbókunum, har børnini sjálvi kunnu leita eftir fólkum, djórum og lutum. Bókin er á tremur við myndum. Søgurnar í bókini eru eisini nógvar, men tær sleppa børnini at finna uppá sjálvi.

Í bókini *Stolni Steinurin* boðar tað ikki frá góðum, tá heilagi friðarsteinurin verður stolin frá tí lítla staðnum við Grønavatn. Ófriður og myrkar tíðir nærkast í lítlu bygdini. Tað er bara eitt, sum kann fáa frið aftur í lag millum kubbar, tøppar, stjørnusavnarar og træleyparar: Friðarsteinurin má finnast og fáast heimaftur.

Lítli kubbin, Píl, má út á eina langa og vandamikla ferð saman við gákandi og braneggjaða rókinum Olla, so tey kunnu finna steinin og bjarga sínum vinum.

Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út *Vár-meldurbók* og *Stolni steinurin*, sum er tann fyrsta í røðini um Grønavatn.

**ave**



# Herviligi Henry er aftur




**Tvær nýggjar bøkur eru komnar við átta søgum, har Herviligi Henry bæði rýmir heimanífrá og sleppur í sjónvarpið**

NÝGGJ BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

*Kæru foreldur hjá Henry*
*Tað nívir at skula siga tykkum, at Henry í dag:*
*Skumpaði Grettir*
*Legði fót fyri Dorit*
*Fírdi Øssur*
*Klípti Egga*
*gjørdi ókvæmisljóð, tugdi tyggigummi og tosaði allatíðina í tímanum*

*Vinarliga*
*Bænadikta Blóð-Øks*

Tað er ikki hissini Herviligi Henry fær á skaftið ein vanligan skúladag – men ikki júst slíkt, sum foreldrini er so errin av. Tá tey fyri triðju ferð í somu viku fáa bræv frá lærarinnuni Bænadiktu Blóð-Øks um, hvussu illa Herviligi Henry skikkar sær í skúlanum, halda tey, at nú kann vera nokk.

Tað heldur Herviligi Henry eisini, so hann avger at rýma heimanífrá, langt út í frumskógin, har ongin foreldur ella lærarar eru at plága hann.

Men ein dagin gerst Herviligi Henry so øgiliga svangur, og brádliga kennir hann luktin av heitum pannukøkum ... Hvat so er at gera hjá Henry, fáa vit meir at vita um í nýggju bókini *Herviligi Henry verður knappliga ríkur*.

Í hinari bókini um Henry, sum eitur *Herviligi Henry í spøkilsishúsinum*, fær Henry sjálvur eitt bræv. Ikki frá skúlanum, tíbetur, men frá Sjónvarpinum, sum biður hann koma við í sendingina Svansi-varpið, har alt kann henda ...

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tær báðar nýggju bøkurnar um Herviliga Henry.